GJALDSTOVAN

**Tíðindi 1:** Á heimasíðu og @

**Bókingar um ársskiftið**

**Fíggjarárið 2024**

Bókingar, sum skulu við í 12. tíðarskeið í 2024, skulu hava bókingardagfestingina 27.12.2024

- Í kreditor-, verkgongdar- og debitoraskipanini skal í teigin ”GL Date” verða skrivað ”27.12.2024” (ella lægri, t.e. 1. til og við 27. desember 2024) ella ”12-24”.
- Í høvuðsbók skal í teiginum ”Period” verða skrivað ”12-24”.
- Aðrar góðkendar búskaparskipanir, sum senda inn upplýsingar via webservice, skulu brúka bókingardagfestingina 27. desember 2024.

Minnist til ikki at brúka dagfestingarnar 28., 29., 30. og 31. desember sum ”GL Date”.

Tá ið 12. tíðarskeið í 2024 verður latið aftur, boðar Gjaldstovan á heimasíðuni frá, hvussu skrásett tá skal verða uppá 1. ískoytisskeið 2024 (tíðarskeið 13-24).

**Fíggjarárið 2025**

Um ávísingar skulu bókast fyri fíggjarárið 2025, verður ein dagfesting í januar 2025 sett í teigin ”GL Date”, t.d. ”05.01.2025”.

- Í kreditor-, verkgongdar- og debitoraskipanini skal í teigin ”GL Date” verða skrivað t.d. ”05.01.2025” ella ”01-25”
- Í høvuðsbók skal í teiginum ”Period” verða skrivað ”01-25”.

---

**Tíðindi 2:** Á heimasíðu og @

**Eyðmerking av skjølum, sum verða send Gjaldstovuni at skráseta**

Við ársskiftið 2024/2025 er týdningarmikið, at stovnarnir týðiliga eyðmerkja skjølini, teir senda Gjaldstovuni at skráseta - tað veri seg lønarumbønir, kreditorfakturar e.a. - á rætta fíggjarár, ávikavist ”2024” og ”2025”.

---

Kvíggjartún 1 | Postsmoga 2009 | FO-165 Argir | Tlf. (+298) 352400 | gjaldstovan@gjaldstovan.fo